Eldrasambýlið í Nes kommunu:

# Verður helst bygt í trimum byggistigum

**Væntandi verða 8 búpláss við í fyrsta byggistigi, sum ætlandi byrjar seinni í ár.**

ELDRASAMBÝLI
*Vilmund Jacobsen*

Nes kommuna fyrireikar nú av álvara bygging av eldrasambýli á Toftum. Stórur partur av útgravingararbeiðinum og planeringini er gjørt.

Tað er Fuglø Arkitektar í Klaksvík, sum hava gjørt tekningarnar til eldrasambýlið. Hesar eru viðgjørdar í kommununi í seinastuni.

- Fíggjarkarmarnir eru avmarkaðir. Vit hava tí hugsað okkum at gera arbeiðið í trimum byggistigum. Ætlandi koma 8 búpláss við í fyrsta byggistigi, sum væntandi byrjar av álvara seinni í ár, sigur Súni í Hjøllum, formaður í tekn-isku nevnd.

Á fíggjarætlanunum fyri 2000, 2001 og 2002 hevur peningur verið játtaður til endamálið. Á verandi fíggjarætlan fyri 2002 standa 2 miljónir krónur til endamálið.

Eldrasambýlið verður bygt norðanfyri Føroya Banka, og har verður eisini gjørt eitt stórt alment parkeringspláss, sum eitt nú skúlin og onnur, sum virka í kommununi, fara at fáa gagn av.



*Her skal eldrasambýlið í Nes kommunu byggjast, beint norðanfyri Føroya Banka. Ætlanin er at fara undir fyrsta byggistig av trimum seinni í hesum árinum.*

## Stórur tørvur og góður vilji

Súni í Hjøllum sigur, at viljin í bygdaráðnum at fremja ætlanina um eldrasambýlið er góður.

- Longu bíðilistarnir til ellis- og røktarheimspláss eru týðilig tekin um, at tørvurin er stórur, og at stovnspláss vanta. Hóast heimarøktin eftir umstøðunum ger eitt gott og samvitskufult arbeiði, má ásannast, at mong eldri fólk sita í rættiliga stórum einsemi og partvís í hjálparloysi, tí neyðuga játtanin til skipanina er alt ov lág í mun til tørvin.

Bygdaráðslimurin fegnast um, at tað nú er líkt til, at bæði kommunal-og landspolitikkarar eru medvitandi um støðuna og viðurkenna, at bøtast má munandi um umstøðurnar hjá teimum eldru.

- Landsfelagið hjá pensiónistunum hevur gjørt eitt megnar arbeiði til tess at vísa á og lýsa umstøðurnar hjá teimum eldru, sigur Súni.



*Í sambandi við byggingina av eldrasambýlinum, fer Nes kommuna eisini at gera eitt stórt alment parkeringspláss, sum eitt nú skúlin og onnur fáa gagn av.*

## Útbyggja í Runavík

Nes kommuna hevur annars játtað at vera við í ætlanini at útbyggja Eysturoyar Røktar-og Ellisheim við 24 búplássum

- Vit fegnast um tey framstig, sum eru gjørd seinastu árini, eitt nú við eldrasambýlum í Fuglafirði og á Eiði.

Súni í Hjøllum heldur tað vera rætt at miðja eftir, at kommunurnar sjálvar byggja eldrasambýli og eldraíbúðir og annars samstarva um ellis-og røktarheimini, soleiðis sum kommunurnar í Eysturoynni gera.

# Friðingin broytt av praktiskum orsøkum

**- Vit hava rættað linjuna, sum var 345 stig í beinari linju úr Mýlingi til 365 stig, sigur Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Nógv tos hevur verið um øktu friðingarnar vestanfyri og norðanfyri í vár, og søgur hava gingið um politiskt trýst, rossahandlar og valagn.

Eisini hevur verið frammi, hví friðingin í øki 2 norðanfyri er broytt í vár, soleiðis at línubátarnir hava fingið betri pláss.

Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri, sigur, at avgjørt varð at broyta friðingarnar norðanfyri av praktiskum orsøkum.

- Tað einasta, sum gjørt er, er, at beina linjan úr Mýlingi, sum var 345 stig, er broytt ella rættað upp til 360 stig. Línumenn siga, at skjótt er at enda skeivu megin, tá ið linjan ikki er rættvísandi, og tað hava vit so gjørt í seinastu kunngerðini. So, hetta er ein praktisk broyting meira enn nakað annað, sigur Jørgen og vísir á, at broytingin samstundis førdi við sær, at línubátarnir fingu eitt sindur betri pláss at royna norðanfyri.

Sosialurin hevur skilt, at útróðrarmenn, sum royna við snellu, eru ikki serliga fegnir um hesa broyting.

Søgur hava gingið um, at broytta friðingin ikki hevur verið nóg væl kunngjørd, men hesum afturvísir fiskimálaráðharrin og sigur, at kunngerðin er lýst sum vanligt.

## Friðingin vestanfyri

Jørgen Niclasen vísir á, at vit hava tvey høvuðsgýtingarøki fyri tosk. Hesi eru norðanfyri - á Norðhavinum, teir kalla og vestanfyri í Sands-ella Vágahavinum.

- Eftir at hava ráðført okkum við Fiskirannsóknarstovuna, valdu vit at víðka friðingarnar í kassanum vestanfyri, soleiðis at hesar nú røkka longur inn og nakað longur norður. Frammanundan var økið vestanfyri friðað inn á grunnlinjuna, men nú gongur friðaða økið inn um grunnlinjuna, sigur hann.

Jørgen Niclasen vísir á, at fyrr var taðsoleiðis, at lína og trol kundu ikki royna á somu leið, men nú er toganum líka so nógv millum snelluna og línuna, tá ið roynt verður um somu leiðir.

*- Fyrr var taðsoleiðis, at lína og trol kundu ikki royna á somu leið, men nú er toganum líka so nógv millum snelluna og línuna, tá ið roynt verður um somu leiðir.*





# BP skerjingar skaka Aberdeen

**Hesar hava tó neyvan nakað at gera við komandi ætlaninar hjá BP á Atlantsmótinum tvs. á økinum vestan fyri Hetland og eystan fyri Føroyar.**

OLJA
*Jan Müller*

Hóast nýggj fund eru gjørd í Norðsjónum í seinastuni og stóru oljufeløgini hava gjørt av at gera risastórar íløgur í oljuvinnuna har, so eru eisini myrk skíggj at hóma. Í farnu viku fór ein skelkur gjøgnum europeiska oljuhøvuðsstaðin Aberdeen. Risastóra oljufelagið BP hevur gjørt av at siga upp 500 fólkum, og útlit eru fyri uppaftur fleiri uppsøgnum um ikki so langa tíð. Hetta hendir bert stutt eftir, at oljufeløg hava boðað frá stórum útbyggingum av nýggjum sum gomlu feltum.

Talan er í fyrstu atløgu um uppsagnir á høvuðsskrivstovuni hjá BP í Dyce í Aberdeen umframt størv á oljupallum og oljuterminalum á landi, eitt nú Sullom Voe í Hetlandi, har nøkur størv fara. Tað hevur ljóðað, at BP fór at skerja starvsfólkatalið við 40%, men tað verður víst aftur. Sambart Press and Journal standa onnur 1650 størv, her serstakliga undirkontraktorarar í vanda, men tað verður víst aftur av leiðsluni í BP. Tilsamans arbeiða umleið 5000 fólk hjá BP, har ein partur eru avtalur við undirleverandørar.

Hóast BP sigur, at uppsagnirnar ikki skulu takast sum annað enn rationaliseringar, hava tíðindini tikið aberdeenbúgvar á bóli. Mett verður, at tað kann eisini fáa stórar ringvirkningar "knock-on effect" fyri bæði tyrlufeløg og útgerðarfeløg. BP, sum er størsta oljufelagið, ið arbeiðir í bretskum øki, er við á 39 oljupallum í bretskum sjógvi. Felagið framleiðir árliga 900.000 tunnur av olju í bretskum øki ella 20% av samlaðu bretsku framleiðsluni. Harav kemur ein partur frá oljukeldunum skamt frá føroyska markinum.

Scott Urban, varaforseti hjá BP fyri norðara og vestara part av Europa sigur við skotska blaðið, at orsøkin til uppsagnirnar eru náttúrligar, soleiðis at skilja, at nýggj tøkni minkar um manningartørvin á eitt nú pallunum. Her er tað serstakliga nýggja tøknin í fiburoptiskum kaðalum, sum ger, at nógv av arbeiðinum, sum fyrr varð gjørt á pallunum, nú kann gerast í landi. Eisini fer BP nú at brúka "flúgvandi" manningar at arbeiða á fleiri pallum, soleiðis at tað slepst undan at hava eina manning á hvørjum palli til tær ymsu uppgávurnar. Scott Urban sigur við skotska blaðið, at BP við sínum seinasta útspæli vil gerast betri følt fyri at møta framtíðar avbjóðingum. Hann vísir aftur, at BP hevur mist áhugan fyri Norðsjónum. Tvørturímóti fer BP bara í ár at gera íløgur í Norðsjónum uppá meira enn 8 milliardir kr.



Fyri føroyingar hava tiltøkini hjá BP eisini áhuga, tí felagið er tað mest virkna á føroyska landgrunninum. Tað skilst, at felagið fer ikki at bora aftur á landgrunninum fyrr enn í 2004. Tað hevur bundið seg til at bora tveir brunnar aftrat í sínum loyvi. Men vánaligu úrslitini frá boringunum í fjør hava so gjørt, at felagið vil endurskoða arbeiðsætlaninar. Stóra útbyggingin hjá BP av Clairfeltinum, sum liggur vestan fyri Hetland, er mett at kosta góðar 7 milliardir og byrjar oljuframleiðslan har í 2004. Hóast BP fór púra skeivt í sínum metingum av møguligum oljufundum á Atlantsmótinum báðumegin markið, so er neyvan hugsandi, at felagið fer at missa áhugan fyri hesum útjaðaraøkinum, ið eisini fevnir um Føroyar. Útbyggingin av Clairfeltinum og íløgur í rørleiðingsskipanir í økinum merkja, at felagið trýr uppá hetta stóra økið.

# Agip fer helst at útseta boring

OLJA
*Jan Müller*

Hóast einki er komin alment fram enn um møguliga útseting av fyrstu boringini hjá Agip og Føroya Kolvetni frættist frá keldum í oljuheiminum, at tað er rættiliga sannlíkt, at Agip, sum er fyristøðufelag fyri loyvinum á føroyska landgrunninum, fer at søkja Oljumálastýrið um loyvi at útseta sína boring til í næsta ár.

Tíðin nærkast til at freistin gongur út fyri at bora brunnin, tvs. í august, og tí má roknast við, at italska felagið skjótt fer at kunna Oljumálastýrið um sínar ætlanir og ynski, uttan mun til hvønn vegin tað ber. Tað er eingin loyna, at heldur óvæntaðu turru brunnarnir hjá Statoil og BP og so fundið hjá Hess í nógv djúpri løgum enn væntað hava gjørt, at øll oljufeløgini á landgrunninum og harímillum eisini Agip hava verið noydd til at endurskoða allar sínar arbeiðsætlanir. Heldur enn at fara út í blindum at bora vilja feløgini gera sítt heimaarbeiði til fulnar. Fyri leitingina við Føroyar vil hetta uttan iva verða tað besta skilur blaðið á keldum.

Hóast vit missa eina boring nú, so er betur at fáa eina boring í næsta ár, sum hevur størri møguleika at raka við olju og gass verður sagt. Tískil má roknast við, at ein áheitan frá Agip um at útseta boringina í veruleikanum kenst kærkomin fyri føroyskar oljumyndugleikar. Eyðun Elttør, landsstýrismaður vil ikki gera nakra viðmerking til hetta í løtuni annað enn, at teir rokna við at hoyra frá Agip skjótt. Sjálvur heldur hann tað er sera umráðandi, at feløgini kenna seg trygg við sínar útrokningar og seismisku tulkingar, áðrenn farið verður at bora. Fyri Føroyar hevur tað størst týdning, at olja verður funnin, og ikki nær tað verður borað.

# Samanleggingar eisini týdning fyri Føroyaøkið

**Stórar broytingar henda í oljuheiminum við uppkeypi og samanleggingum av feløgum. Henda gongdin kann eisini fáa týdning fyri leitingina á Føroyaøknum. Tað kann ganga báðar vegir, men í fyrstu atløgu tykist hetta at kunna gagna leitingini, tí tað í fleiri førum verða størri og sterkari feløg, sum eru við í leitingini**

OLJA
*Jan Müller*

Tað sýnist ikki sum at tíðin er farin frá sokallaðu "mergjarunum" í oljuvinnuni tvs. hetta við at keypa upp smærri oljufeløg og leggja tey saman við størri feløgum. Hetta er so eisini nakað, sum rakar fleiri av oljufeløgunum, ið arbeiða á føroyska økinum ella í grannalagnum. Fleiri "mergers" tvs. yvirtøkur ella samanleggingar eru í gongd. Texaco og Chevron leggja seinastu hond á samanlegging. Tað sama gera Conoco og Phillips. Og BP hevur eisini keypt upp stóran part av týska Veba Oil, meðan Pan Canada er við at keypa upp restina av tí felagnum. Um hetta er gott ella ringt fyri áhugan og royndirnar at leita eftir olju her hjá okkum ber so til at hava ymsar metingar um. Texaco fekk einki loyvi í 1. útbjóðing men tykist framvegis liggja uppá lúr. Tað skal bora í bretskum øki í summar tætt upp at føroyska markinum í summar. Eitt møguligt fund har kann fáa stóran týdning fyri okkum. Chevron hevur ikki havt stórvegis áhuga fyri Atlantsmótinum, men við at leggja saman við Texaco kann hetta broytast, soleiðis at tú her fært tvey stór oljufeløg inn í øki ístaðin fyri bara tað eina.

Conoco hevur verið her áður og søkti um loyvi saman við Texaco. Tað gav sum sagt ikki úrslit. Við at leggja saman við Phillips verður tað so aftur partur av leitingini her. Tvs. at her verður støðan eisini styrkt.

Veba hevur verið partur av Statoilbólkinum og verður leitiparturin keyptur upp av Pan Canada verður áhugavert at síggja, um hetta felagið eisini fer at koma inn á føroyska økið. Felagið er júst vorðið virkið á bretska landgrunninum og gjørdi herfyri eitt stórt fund í Norðsjónum.

Nú ljóðar, at tvey av feløgunum, sum eru við í 1.útbjóðing her hjá okkum, eru hugað fyri at keypa upp eitt felag, sum eisini er virkið um okkara leiðir. Talan er um Enterprise, sum er partur av Statoilbólkinum. Bæði Statoil og Agip eru sinnað til at keypa Enterprise. Bretska ávísin The Business metir, at Statoil er sinnað til at keypa Eneterprise fyri 40 milliardir krónur. Hetta verður sostatt størstda keypið ein norsk fyritøka ger í útlandinum. Sambart BBC sunnudagin er eisini Agip sinnað at keypa Enterprise, sum herfyri fekk nýggjan stóran. Tað var Sam Laidlaw, sum vitjaði í Føroyum fyri nøkrum árum síðani, tá hann var ein av ovastu stjórunum í Amerada Hess. Fyri kortum fór hann frá Hess til Enterprise.

## Dana meira virkið

Tað frættist eisini, at breska oljufelagið Dana Petroleum, sum eigur part av Føroya Kolvetni og sum er tøkniligi og strategiski partnarin hjá felagnum og hvørs eini stjóri er Graham Stewart, ið eisini er nevndarformaður í Føroya Kolvetni. Sambart Press and Journal skal Dana Petroleum hava keypt fleiri av loyvunum hjá Agip í bretskum sjógvi fyri eitt samlað virði uppá 500 mill. kr. Við hesum keypinum tvífaldar Dana sín lut í olju- og gassfundum í Bretlandi til seks við eini dagligari framleiðslu uppá 20.000 tunnur. Tom Cross, stjóri hjá Dana sigur við Press and Journal, at teir fara at brúka økta peningastreymin til leiting í Europa og Afrika. Umboð fyri Agip sigur, at sølan til Dana merkir ikki, at felagið hevur mist áhugan fyri bretska landgrunninum. Felagið er í ferð við at rationalisera og fer framhaldandi at gera íløgur í hesum øki. Í 2000 keypti Agip felagið British Borneo og í fjør Lasmo. Tað eru loyvi hjá hesum feløgum, sum Agip nú sleppur sær av við.

Sum sæst henda framhaldandi stórar broytingar í oljuheiminum. Og hesar broytingar umfata eisini fleiri av oljufeløgunum, sum eru virkin um okkara leiðir. Um hesar mongu broytingar í longdini eru ein fyrimunur fyri leitingina á landgrunninum vil tíðin so vísa. Men sterkari feløgini, sum eru við í leitingini í Føroyum, eru bæði tøkniliga og fíggjarliga, tess størri skuldi samlaða orkan verið at gera íløgur í hesum nýggja og jomfrúuliga økinum.